# TILTØK

**Gudstænastur**
**10. sunnud. eftir trinitatis**
*Nólsoy:* kl. 12 Bjarni Bæk
*Fríðrikskirkjan:* kl. 11, altarg., Martin R. Jacobsen
*Haldórsvík:* kl. 11, altarg., Mogens T. Christensen. Talvan gongur fyri Sjómansmissiónina
*Sørvágur:* kl. 11, altarg., David Johannesen
*Havnar kirkja:* kl. 11, Sverri Steinhólm
*Vesturkirkjan:* kl. 11,
*Kirkjubøur:* kl. 12.30, altarg.,
*Hestur:* kl. 17, altarg., Bergur D. Joensen
*Kirkja:* kl. 12, Elsa Funding
*Rituvík:* kl. 11, altarg., Meinhard Bjartalíð
*Funningur:* kl. 11 messa
*Gjógv:* kl. 12.30 messa, Emil Olsen
*Sjóvar kirkja:* kl. 11, altarg.,
*Skálafirði:* kl. 16, JógvanFríðriksson
*Fuglafjørður:* kl. 11, altarg.,
*Hellurnar:* kl. 19, altarg., Uni Næs. Í Fuglafjarðar prestagjaldi gongur talvan fyri Ytri Missión
*Sumba:* kl. 12, altarg., Patrick de Neergaard
*Skálavík:* kl. 12, altarg., Jákup R. Hansen
*Christianskirkjan:* kl. 11, Hans Eiler Hammer. Talvan gongur í Christianskirkjuni fyri sunnudagsskúlan hjá heimamissiónini
*Kunoy:* kl. 12, altarg., Niels Pauli Danielsen

**Frá Samkomuni Lívdin**
**Í Fimleikarahøllini í Hoyvíkar skúla.**
Sunnumorgunin kl. 10.30 familjuløta, kl. 11.10 ein steðgur við drekka.
Tilbiðjunarmøti verður 11.30 við talu, lovsongi og breyðbróting.
Barnatiltak verður í Hoyvíkshøllini frá kl. 11.30 - 12.15.
Heimasíðan: www.livdin.fo

**Frelsunarherurin, Tórsgøta 19**
Leygardagin kl. 11 Útimøti við Handilskjarnan – um viðrar.
Sunnudagin kl. 18 Møti har majorarnir Thorbjørn og Ada Vang syngja og tala. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið við Landavegin**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ Kajberg Davidsen.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, ABC v/ Liljan Jacobsen, evnið er: At vera loystur frá ótta og tunglyndi 1. partur, kl. 18 Møti.
Mánadagin kl. 19.30 Breakthrough worship og bønarskúlin. Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067. Telefonin svarar mán-frí frá kl. 8-16.
www.filadelfia.fo

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis verður barnaansing. Á møtinum talar Rodmundur í Liða. Sunnudagsskúlin byrjar aftur sunnudagin 22. august kl. 12. www.hebron.fo

**Katólska Kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Michael Bradley presti, í Mariukirkjuni.

**Meinigheitshúsið**
Sunnudagin kl. 18 Møti v/ Sverra Steinhólm.

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Sunnudagin kl. 19 Møti, sangløta og innsavnan.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Saron, Vestmanna**
Morgunmøti v/ breyðbróting verður sunnudagin kl. 11 v/ Jóan Hendrik Hansen. Verið hjartaliga vælkomin.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Sunnudagin kl. 18 Møti við Boga Olsen. Eingin sunnudagsskúli í summarfrítíðini. Øll eru hjartaliga vælkomin. www.jesus.fo

**Thabor, Fuglafjørður**
Sunnudagin kl. 18 Møti.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti við símun Jaocbsen.

**KFUM & K, Klaksvík**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 Møti við Suna Jóhannessen og kl. 21 Ungdómsmøti. Hjartaliga vælkomin til hesi tiltøk.

**Getsemane, Klaksvík**
Sunnudagin kl. 11 Møti. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ ungdómsbólkinum.

**Betania, Skopun**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti. Tú ert vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 17.30 Bøn- og lovsangsløta, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið, Skálavík**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti. Teir fýra av Argjum syngja og tala. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti við Katrin og Signheðin. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Leygarkvøldið kl. 20 Útimøti í Hovi.
Sunnukvøldið kl. 18 Evangel. møti, Hallur Ludvig talar.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 18 Evangel. fundur, kl. 21 Útifundur – um viðrar.
Ónsdagin kl. 20 Bønar- og uppbyggingarfundur.

**Sion, Vágur**
Sunnudag kl. 11 Morgunmøti. Mánakvøld kl. 21 Bønarmøti og bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja um tær tørvar forbøn.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 16. august*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10-18 Ítriv
kl. 14-18 Kortspæl, landastrok, bobbspæl, telving, dart og onnur spøl
**Túrur: Við bussi til Kaldbaks 25. august kl. 14.00 síðan verður gingið eftir bygdavegnum niðan til Brúna- og Stóravatn. Tilm. 316491**
*Týsdagin 17. august*
kl. 10-11.30 Sangur, Jóhan R. Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15 Ábyrgd fyri egnari heilsu, Jógvan Fríðriksson
*Mikudagin 18. august*
kl. 10-12 Hvat skulu vit gera í vetur?
og kl. 14-16 Øll eru hjartaliga vælkomin at koma við hugskotum
*Hósdagin 19. august*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14-16 Boccia í kjallaranum
*Fríggjadagin 20. august*
kl. 10-12 Hvat skulu vit gera í vetur?
og kl. 14-17 Øll eru vælkomin at koma við hugskotum

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Felagið Tórshavn – gongutúrur**
Sunnumorgunin 15. august verður gongutúrur niðan á Ritugjall, Leirvík. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Havið heit og góð gonguklæðir og ein drekkamunn við. Tilmelding.

**Frá Ferðavinnuni í Suðuroy**
Bussur fer av Kunningarstovuni í Vági kl. 10 og av Kunningarstovuni á Tvøroyri kl. 10.30. Koyrt verður til Øravíkar og gingið niðan til hagaportrið har varðagøtan til Porkeris byrjar. Staðkend heimildarfólk eru við á túrinum. Bindandi tilm. á tlf. 284342.
**Sjórænaratúrur við Johannu leygardagin**
Johanna fer av Vági kl. 17 og verður væntandi aftur kl. 19. Johanna loysir frá landi, men fer bert út millum flakavirki og grótkastið har hon leggur seg. Hvat fer at henda er enn ein loyna. Matur og drekka fæst á túrinum. Tilm. á tlf. 284342.

**Eldrafelagið Nón, Saltangará**
Vit fara útferð í Vágarnar 22. august. Farið verður frá Sjómansheiminum í Runavík kl. 9.30. Tey, ið ynskja at vera við, biðjast tekna seg á tlf. 447718 innan 16. august.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Vágs Pensionistafelag**
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmøðrafelag. Allir pensionistar og øll omanfyri 60 ár eru vælkomin.
Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

**NA (Anomymir narkomanar)**
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 á Tinghúsvegi 37, Tórshavn. www.aca-danmark.dk.
E-mail:
acafaroeislands@hotmail.com

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

## BRÚDLEYP

21. august kl. 15.00 giftast í Hvalvíkar Kirkju, Annika Sørensen, Tórshavn, og Karl Andreasen, Streymesi. Veitslan verður fyri innbodnum í HB-húsinum kl. 19.00.

Leygardagin 21. august giftast í Christianskirkjuni, Olevina Jacobsen og Dávið K. Sundsskarð, bæði úr Klaksvík. Veitslan verður fyri innbodnum í Skálanum kl. 18.30. Brúðarhús verður sunnudagin 22. august á Fosságøtu 28, har øll eru hjartaliga vælkomin.

## 2 X 60 ÁR

Leygardagin 21. august fylla tvíburarnir, Tóta og Oda, 60 ár. Tey, ið vilja gleða tær á degnum, eru hjartaliga vælkomin í Sjónleikarhúsið hendan dagin millum kl. 11 og 18.

## SILVURBRÚDLEYP

Mikudagin 8. sept. hava Hallur og Ester Mohr verið gift í 25 ár. Vælkomst verður í bygdahúsinum Samljóð í Skopun leygardagin 28. august kl.19.00. Tey ið ynskja at gleða silvurbrúðarparið við at koma í veitslu verða biðin um at siga frá á tlf. 361156, 361395 ella 444412 áðrenn 15. august. Í sambandi við veitsluna siglir Teistin av Skopun á Gomlurætt kl. 0200.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*»Stúrið tí ikki fyri degnum í morgin!«.*
*Matt. 6,34*

Við til mannalívið hoyra stúran og ótti. Vit stúra fyri, um vit fáa nóg mikið av tí tímiliga, um vit fáa nóg nógvar pengar og ríkidømi til dagin og vegin og til lívsins uppihald. Og hetta er kanska nattúrligt. Vit liva í einum heimi, har nógv skal til fyri at liva og yvirliva.

Og øll fáa ikki eins nógv, tá talan er um pengar. Hesin veruleiki skal ikki undirmetast.

Men hóast hetta, so sigur Jesus, at vit onga grund hava til at stúra og óttast og falla í fátt. Tú hevur Gud við tær. Hann er ikki langt burtur frá nøkrum av okkum. At trúgva er at taka henda Gud uppá orðið. Hann lovaði okkum í dópsstund okkara, at hann fór at verða við okkum allar dagar alt til veraldar enda. Og hesi lyfti halda, eisini tá lívsins sjógvar bróta.

Tak henda Gud við inn í lív títt, so verður lívið ríkt fyri tær og tú fært mál og mið í lívinum. Ikki so at skilja, at so gongur alt við í lívinum og so verða allar gátur loystar og allir spurningar svaraðir. Nei, als ikki. Men so at skilja, at tú fært samanhang í lívinum og fært megi og kraft frá Gudi til at tulka tað, sum hendir við tær og uttanum teg. Tú fært trúgv, sum kann flyta fjøll. Tú fært trúgv, sum kann liva við spurningunum og gátunum til Harrans dag. Hesa trúgv geva andin og orðið okkum í kristna felagsskapinum. Og henda trúgv rekur út stúran og ótta. Í hesi trúgv vilja vit liva og virka í heiminum til Harrans dag. Og við hesi trúgv sigra vit á trupulleikum og vansum inntil Guds ríki kemur í dýrd.

At eiga hesa trúgv er at eiga Kristi sinnalag, sum er at vera undir Guds ávirkan og leiðslu. Og tað er at liva kærleikans lív í einum hørðum og køldum heimi. Men tað er soleiðis at vera salt og ljós í hesum heimi. Tað er at vera kærleikans umboð og amboð. Tað er henda haldgóða trúgv, sum rekur út stúran og ótta og sum gevur mál og mið fyri lívi okkara. Og málið er Guds ríki á himni.

Amen.

**David Johannesen**



# TILTØK

**AA-fundir í Havn**
**Tinghúsvegur 37**
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15 Stóri bókafundur
Mikudag: kl. 20.00–21.00 Stiga- og siðafundur
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: Opin fundur kl. 09-10, kl. 17.00–18.00 og kl. 22.30-23.30
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 16.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Fyribyrgingarráðið**
*Argjaboðagøta 7 · 160 Argir*
*postrúm 135 · 110 Tórshavn*
tlf. 315155 · fax 320272
Teldupostadr.:
fyribyrg@fyribyrg.fo
heimasíða: fyribyrg.fo

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552.

**Lymfødemfelagið**
*Box 2113, FO 165 Argir*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Heilafelagið**
Íslandsvegur 10 · tlf. 317373
T-post: heilaf@post.olivant.fo
Nærri upplýsingar, eisini við ráðgeving, finst á heimasíðuni: www.mbf.fo undir »Um MBF«.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894.
Fø. Sparikassi 442027-8.

**Parkinsonfelagið**
*MBF-húsið, Íslandsvegur 10C*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Kristinu, tlf. 317317.

**Javni**
*Hoydalsvegur 40 · 3 hædd*
Skrivstovan er stongd, vegna summarfrí, frá 12. juli – 16. august.
Vit hava eisini eina heimasíðu: www.javni.fo og t-post adressu: javni@post.olivant.fo har tit altíð eru vælkomin at senda spurningar ella viðmerkingar.

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Føroya Astma/Allergifelag**
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c, Tlf./fax 311419.
Upplatingartíðirnar eru: hvønn hósdag kl. 16.30-18.

**Felagið fyri lesi- og skriviveik**
*Postadr.: MBF-Húsið*
*Íslandsvegur 10c*
Endamál felagsins er at hjálpa teimum ið hava lesi- og skrivitrupulleikar.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð men samband fæst við felagið á tlf. 441541, Anne Karin Kjeld og 318867, Laila Egholm.

**Giktafelag Føroya**
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Opið er týs- og hósdag frá kl. 13.00-16.00.
Tlf. 310237. www.gikt.fo
T-postur: gikt@gikt.fo
**Stongt er vegna summarfrí** frá 8. juli til og við 17. august.

**Deyvafelag Føroya**
*Íslandsvegur 10B*
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 317597, fartlf. 222381, skrivitlf. 316929 · fax 313609 og teldupostadr. deaf@deaf.fo heimasíðan: www.deaf.fo

**Føroya Felag Móti Krabbameini**
*Grønlandsvegur 58, Tórshavn*
Telefontíð mánadag til fríggjadag frá kl. 13-15.
Tlf. 317959.
Teldupost: ffk@post.olivant.fo
www.ffk.fo

**MBF – Meginfelag teirra brekaðu**
*Íslandsvegur 10c*
*FO-100 Tórshavn · tlf. 317373*
MBF skrivstovan er soleiðis opin: Í viku 28, mánadag, mikudag og hósdag og í viku 29, týsdag, mikudag og hósdag frá kl. 9-15.

**Alzheimerfelagið**
Tórsbyrgi 16 · 100 Tórshavn
Heimasíða: www.alzheimer.fo
t-postur: sigmo@post.olivant.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á tlf. 313102.
Demenslinjan er telefonráðgeving í øllum viðvíkjandi demens. Tlf. 313102 svarar týsdag kl. 18–20.

**Epileptikarafelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

**Cøliakifelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664 Beinta tlf. 310574 Henning tlf. 314783.

**Sinnisbati**
Íslandsvegur 10 C, 100 Tórsh.
tlf. 322544 · Fax 310813
T-postur:
sinnbati@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin mikudag frá kl. 16-18. Fyrsta mikudag í mánaðinum er opið til kl. 19.30.
Tú ert vælkomin at ringja og spyrja um alt, sum hevur við sinnistrupulleikar at gera á tlf. 322544.

**Nýrafelagið**
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail: thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 314796, Hallbjørg

**LISA -**
*Skrivstovan hjá Listafólkasambandið Føroya í Pætursarstovu*
Vegna summarferiu verður skrivstovan stongd í juli. Opið verður aftur sum vanligt mánadagin 2. august.

**Amnesty International, Føroya deild**
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816
Skrivstovan er opin mánadag frá kl. 13.00-17.00 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.
Heimasíðan: www.amnesty.fo
Teldupost: Amnesty-Amnesty.fo

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 15 til 18. LFÚ ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16 til 18.
Tinghúsvegur 18, 3. hædd, Tórshavn.
Tel. 310220 (skrivstovan)
tel. 315015 (ráðgevingin).
Teldupostur:
lfu@post.olivant.fo
Heimasíða: www.lfu.fo

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Samband við felagið fæst við at ringja tlf. 322686.
Umsóknarbløð til Heimavirkisleguna í Danmark í summar kunnu fáast við at venda sær til felagið.

**BRÚKARASAMTAKIÐ**
Brúkarasamtakið er felag fyri brúkarar í Føroyum. Limagjaldið er 100 kr. árliga. Øll, einstaklingar frá 16 ár og feløg, kunnu gerast limir við at skriva til postadressuna niðanfyri, ella venda sær til ein í nevndini: Ingun Simonsen, forkvinna, 317782/211696, ingun@post.olivant.fo
Hans Pauli Strøm, skrivari, 424044/221919,
hps@kallnet.fo
Gunnleivur Dalsgarð, kassam., 314868/311210,
gunnleiv@starvsmf.fo
Høgni Debes Joensen, 311832,
trongrim@post.olivant.fo
Kristina Samuelsen, 311883/211883,
kris@logting.fo
Brúkarasamtakið, Postboks 165, 110 Tórshavn.

**MÁF**
(Meginfelag Áhugaleikara Føroya) heldur til í húsum Hans Andrias Djurhuusar undir Pisuvarða 2, Tórshavn
Tlf. 315624 og 315688, Faks 315924,
e-mail: maf@maf.fo og maf@post.olivant.fo
Heimasíða: www.maf.fo
Opið er: má. og tý. kl. 10-15, mi. kl. 13-18, hó. og fr. kl. 10-15.
Endamál felagsins er at stuðla áhugaleiklist og menna hesa mentunargrein í Føroyum.
Formaður: Hilmar Joensen, Nólsoy. Listarligur ráðgevi: Birita Mohr. Dagl. leiðari: Malan Matras Joensen.

**Føroyingafelagið í Esbjerg**
Danmarksgade 25,
6700 Esbjerg, tlf. 75132747
Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22.00, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.

**Føroyskt felag í Ballerup**
Ryttergården, Pederstrup
2750 Ballerup.

**Føroyingafelagið í Odense**
hevur opið hvørt fríggjakvøld frá kl. 20. Tú finnur okkum á Rugårdsvej 21 (kjallarin), 5000 Odense C.
Tlf.: 25395563
Teldupostur: ffo@post.gs
www.ffo.subnet.dk

**Føroyingafelagið við fjørðin**
Jægerspris. Vit hava ymisk tiltøk nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið, ella lokalt, so ring til Fríði tlf. 47317438 Gudni tlf. 47387748.

**Føroyingafelagið í Aalborg**
Lille kongens gade 10B,
tlf. 98 13 63 30
email: alaborg@alaborg.dk
Álaborg er opið soleiðis: Fríggjadag 17-19 og Leygarkvøld 23-03. Álakórið venur mikukvøld kl. 19.30
Annars verða tiltøk hjá felagnum lýst í Túnatos og á heimasíðuni www.alaborg.dk

**Føroyingafelagið Vesturskin, Bergen**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar við at venda sær til Elsebeth Reines, tlf. 55229049.

**Føroyingafelagið í Reykjavík**
Elin S. Wang, Melabraut 8,
170 Seltjarnarnes, Ísland
Tlf. +354 5522368
E-mail: forrek@visir.is

**Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark**
veitir ráðgeving og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum.
Upplatingartíðir:
mánadag, týsdag, hósdag 11.30-15.30 mikudag 14.00-18.00 og fríggjadag er stongt.
Vesterbrogade 17 A
1620 København V.
Tlf. 33 23 99 80
Fax. 33 23 92 34
Teldupostur:
radgevingin@radgevingin.dk
Heimasíða:
www.radgevingin.dk

**Føroyahúsið í Keypmannahavn**
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Telefonupplýsing: 33231586
Dagliga telefonin: 33231587
Fax 33231588
E-mail addressa:
postur@faroehouse.dk
Heimasíðan:
www.faroehouse.dk
Á heimasíðuni er skráin, smátíðindi, feløgini og links víða um.
Kaffistovan er opin má.- frí. kl. 14 - 19
Bókasavnið um somu tíð.
Føroyskur døgverðamatur, fløgur, bøkur og pløgg fáast til keyps.
Vilt tú leiga ella skipa fyri tiltaki í húsinum, vendir tú tær til leiðaran.

**Føroyingafelagið í Svøríki**
Vit hava tiltøk nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Annu Westfahl á tlf. +46176269536 ella Innu Törnroos á tlf. +468853570.

**Evangeliska Røddin, Odense**
Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

**Malta, Hirtshals**
Sunnudag: Kl. 11: Breyðbróting. Kl. 18: Evangeliskur fundur. Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.

**Eliaskirkjan**
Møti er hvørt leygarkvøldið kl. 19 í kjallaranum í Eliaskirkjuni á Vesterbro Torv, Vesterbrogade 49. Inngongd undir stóru trappuni. 5 min. at ganga frá Hovedbanegården, 2 min. frá Føroyahúsinum. Bussarnir 1, 6, 14, 16, 28 og 550S steðga nærhendis. Sunnudagsskúli er í Eliaskirkjuni hvønn sunnudag kl. 14 í kjallaranum og kl. 11 í barnarúminum á Oyrasundskollegiinum, Dalslandsgade 8 á Amager. Øll eru vælkomin. Nærri fæst at vita frá Atla Rasmussen, tlf. 32969995 ella Róa Rasmussen tlf. 32886480. E-mail: ek_fo@get2net.dk.

**Føroyingafelagið í Århus**
Vestergade 48D
8000 Århus C
Tel. 86 18 06 04
Teldupostur:
aaarstova@hotmail.com
Reglulig tiltøk: Café mánadag-hósdag kl. 16-18.
Barr leygarkvøld kl. 22-03.
MFS kontórtíð týsdag kl. 17-18.
Kórvenjing týskvøld kl. 19.30.
Føroyskur barnaskúli ólíka vikur leygardag kl. 11-14.
Sunnudagsskúli líkavikur sunnudag kl. 14.30.
Vit hava eisini fótbólt, flogbólt og badminton. Um hetta hevur tín áhuga kanst tú koma oman í Áarstovu, ella senda okkum ein teldupost og tú fært at vita hvar og nær vit venja. Tú ert altíð vælkomin í hølini hjá okkum, har tú kanst lesa tey føroysku bløðini, fáa ein ókeypis kaffimunn og møta øðrum føroyingum, sum eru í Århus.

**Føroyingar í Noregi**
E-mail:foroyar@norden.no
Heimasíða: http://www.norden.no/foroyar
Norsk-Færøysk Lag skipar javnan fyri tiltøkum fyri føroyingum og fólki við tilknýti til Føroyar. Tiltøkini verða hildin í Oslo, og nærri upplýsingar um tíð og stað fáast við at venda sær til felagið á tlf. +4722674829.

**Føroyskt barnamøti**
Hvønn mánadag kl. 17 er føroyskt barnamøti í »Fælles Fælleshuset« á C. W. Obel kollegium á Herningvej. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Nærvarpið LUMI radio í Aalborg**
Føroyska sendingin »v/ Betesdabrunnin« er at hoyra á FM 92,2 MHZ miðbýurin, FM 106,5 MHZ Aalborg suður, og FM 107,4 Aalborg norður, hvønn leygardag kl. 10 og verður endursend sunnukv. kl. 20.30.

**Før. gudstænasturnar í Samuelskirkjuni**
Thorsgade 65, 2200 København NV, eru hvønn 1. og 3. sunnudag í mánaðinum kl. 14. (Kirkjan er skamt frá Nørrebros Runddel). Presturin er at hitta á tlf. 38796146.

**Kristnastova**
Birmavej 36, København S, tlf. 32551809 fax. 32586149
e-mail:
kristnastova@get2net.dk
Kristiligur fundur er hvørt fríggjakvøld kl. 20. Møti við breyðbróting er hvønn sunnumorgun kl. 11. Sunnudagsskúli er samstundis. Bussar nr 2A og 12 steðga tætt við Kristnastovu.

**Føroyska nærvarpið í Esbjerg**
Føroyska sendingin »v/Betesdabrunnin« er at hoyra á FM 93,5 MHZ hvønn leygardag kl. 11.30 og verður endursend leygarkvøld kl. 19.30.

**Føroyskt møti í Ålborg**
Føroysk møti eru fyrsta leygardag í hvørjum mánaði kl. 19 í hølunum hjá Bethania kirkjuni á Dag Hammerskjølds Gade 2. Drekkamuður er aftaná, øll eru hjartaliga vælkomin. Tit eru vælkomin at ringja til Annfinn Hjelm, tlf. 29725733.